minst. Eitt skeivt orð, og tú varð tikin og píndur.

Eingin tordi heldur at nevna loyniløgregluna við navni. Tað nærmasta var at nevna hana "dreingirnar við teimum bláu eygunum". Tá vistu øll, hvat tað snúi seg um.

Tað bar heldur ikki til at senda brøv millum lond. Var tað roynt komu tey als ikki fram.

Andrea greiðir frá, at hetta situr so fast í mammuni, at tá hon enn í dag koyrir eitt pappír í skrell, syrgir hon altíð fyri at skræða tað í smá petti. Loyniløgreglan plagdi nevnliga at leita í skrellispannum, og tí ráddi um, at hon ikki kundi finna skjøl, sum vóru so mikið lítið skrædd, at tey kundu vera sett saman og lisin.

Í Rumenina var fosturtøka bannað. Men hetta var ikki av etiskum grundum. Hetta var fyri at fáa fólkatalið í landinum at økjast mest møguligt. Hetta kann so vera sínar sakir. Men kvinnur máttu javnan kannast hjá lækna, hvørt tær høvdu fingið framt ólógliga fosturtøku.

## Grussan Elana

Støðan gjørdist verri og verri í landinum. Støðan hjá forsetakonuni Elana Ceaucescu bøttu ikki um. Hon var illi andin hjá Nicolae. Hon fekk heilt stórt vald. Millum annað skuldi øll skúlabygging góðkennast av henni.

Roynt var at gera hana nógv meira enn hon var. Hon hevði lítlan og ongan lærdóm. Hóast hetta varð hon sett fram sum eitt flogvit, sum gjørdi seg galdandi innan ymisk vísindaøki. Men hetta var alt fupp, og var bert ein liður í hesi persónsdyrkan.

Hon fekk heiðursprógv frá ymiskum lærdum háskúlum, eisini í London, fyri sínar vísindaligu ritgerðir, men sum onnur høvdu skrivað. Men tá ið sannleikin kom fram varð hetta alt afturtikið.

Henda persónsdyrkan varð eisini førd inn í skúlarnar, har børnini vóru lærd, at Elena og Nicoalo Ceucesco vóru sum foreldur hjá teimum. Hetta førdu tey eisini fram í rættamálinum, sum førdi til teirra avrætting. Hvør skúlabók hevði mynd av Ceaucesco á fremstu síðu.

Ceausescu sjálvur dugdi eisini at føra seg fram uttanlands. Í 1980 var hann á statsvitjan í Danmark. Í hesum sambandi vóru hansara røður útgivnar á donskum, og hann fekk Elefantordanin. Tá ið tað rættuliga kom fram, hvat bølmenni hann var, varð elefanturin afturtikin.

## Fólkið gjørdi bart

Hetta gjørdist at enda ov nógv fyri



Tjóðartingið í Rumenia. Hetta sær gott út. Men sum ting var tað bert eitt eiti.



Bygd í Rumenia



Ortodoks kirkja í Rumenia

fólkið. Og í 1989 varð gjørt bart og fólkið gjørdi uppreistur. Tey bæði royndu at rýma, men vóru tikin og sett fyri ein standrætt. Tað varð gjørt skjótt av. Tey vóru avhoyrd, dømd til deyða og beinanvegin skotin. Hetta sást í sjónvørpum um allan heimin. Hetta gjørdist eisini minniligt, tí alt hetta gekk fyri seg á jólum. Men tá lætnaði hjá mongum.

Tað vóru altjóða atfinningar um, at rættargongdin ikki var rættvís. Men her var neyðugt at gera skjótt av. Vandi kundi vera fyri, at russarar vildu bjarga "sínum manni", og eisini mátti forðast fyri, at stuðlar hjá hjúnunum báðum fingu høvdið fyri seg aftur.

## Nú gongur framá

So er spurningurin, hvussu støðan er nú í Rumenina. Fyrst og fremst hava teir fingið frælsi. Teimum nýtist ikki longur at vera rædd fyri at siga sína hugsan, og nú er eisini møguligt at ferðast uttan avmarkingar.

Alt er ikki nóg gott enn, og tað tekur sína tíð at koma burtur úr eini skeivari gongd. Innan heilsuverkið ruggar ikki rætt enn. Hóast øll viðgerð skal eitast fyri at vera ókeypis, so má gjaldast undir borðið til mong lið í viðgerðarskipanina.

Stættarmunurin er framvegis ov stórur. Tey eru nøkur, sum hava tað gott. Miðalklassin er minni her enn í nógvum øðrum londum. Tískil eru nógv, sum langt frá hava tað nóg gott enn.

Men tað er vón fyri framman. Rumenia er komi í ES við øllum teimum møguleikum, sum hetta gevur.

Tað gongur framá, men nógv halda tað ikki ganga nóg skjótt. Men Andrea sigur við sínar ótolnu vinir heima í Rumenia, at hon sær í hvussu er mun hvørja ferð, hon kemur heim.

Nú er eisini satt trúarfrælsi. Fyrr var ein veruligur vandi í at vísa seg í eini kirkju. Loyniløgreglan var eisini til staðar har. Annars eru Constantin og Elana limir í ortodoksu kirkjuni, men tey leggja dent á, at tey eru hóglig.

## Hava álit á forsetanum

Høvuðsvinnurnar í Rumenia eru annars olja, alumininum, stál og landbúnaður. Tað er eisini nógv kol, men góðskan á kolinum er ikki góð.

Annars er Rumenia eitt uppá seg stórt land. Tað er 237.500 ferkilometur og her búgva um 21 mill. fólk. Umleið 88% av fólkinum eru etniskir rumenarar. Meginparturin av restini eru ungarar. Hesir hava ofta hildið seg vera fyri vanbýti í landinum.

Forsetin í Rumenia eitur Trajan Básescu, og tey eru øll samd um, at hann er ein góður maður. Hann hevur eina greiða kós, og hann dugur eisini at seta sínar ætlanir í verk.

## Hvussu endaði dóttirin í Føroyum?

Elena og Constantin eru bæði verkfrøðingar. Tey giftust í 1968, og tey fingu bert tað ein barnið, Andreu, sum er fødd í 1969.

So er spurningurin, hvussu ein rumensk genta endar í Havn? Jú, tað er gjøgnum alnótina! Tey bæði fóru at chatta saman. Hetta endaði við, at Ernst fór til Rumenia at ferðast. Tey fullu bæði fyri hvørjum øðrum. Ikki var tað verri, at foreldrunun eisini dámdu væl Ernst.

Tey blivu gift í eini ortodoksari kirkju í Rumenia. Hetta var nógv øðrvísi enn í Føroyum. Ortodoksa kirkjan er kend fyri at gera meira burturúr tí glæsiliga, enn vit kenna til. Tí mátti presurin hava ein hjálparmann undir vígsluni. Ein partur av vígsluni er, at hvør av pørtunum hevur ein manligan og ein kvinnuligan gubba. Hesi verða so eisini gubbar tá og um, tað koma børn. Verður tað ein genta er tað kvinnan, og er tað ein drongur verður tað maðurin, sum verður gubbi.

Andrea trívist væl í Føroyum. Hon er útbúgvin verkfrøðingur, og hon hevur gott arbeiði í Havn.

Annars hevur verið so mikið av sambandi millum Rumenia og Føroyar, at fleiri rumenar búgva í Føroyum. Hetta samband er eisini við teimum nógvu ferðunum við klæðum og øðrum til Rumenia. Men hetta er meira norðalaga í landinum.

Tað var stak hugnaligt at hitta hesa rumensku familju og at fáa innlit í eitt lív, sum hevur verið so nógv øðrvísi enn tað, sum vit kenna til.

Vit ynskja teimum góða ferð heim aftur og ynskja teimum vælkomin aftur.

Sosialurin